

# Oljuríkir norðmenn: Oljugrunnurin stórt avkast

**Jan Müller**

06.01.2014 - 21:21

Oljan.fo

**Norski oljugrunnurin fer eftir øllum at døma at fáa eitt avkast - vinning - uppá 15% í 2013. Tað eru umleið 130.000 kr. til hvønn tann einasta norðmann, vísir ein nýggj kanning.**

Um so er at avkastið verður 15%, so verður tað næstbesta avkastið úr oljugrunninum nakrantíð. Í 2009 tá virðisbrævamarknaðirnir komu fyri seg aftur eftir fíggjarkreppuna, var avkastið 25,6%. Avkastið í 2013 kemur frá mongu partabrøvunum skrivar norska blaðið Aftenposten.

Partabrøvini hækkaðu nógv í 2013 orsakað av vónunum um, at heimbúskapurin fór at standa seg betri.

Hetta merkir ikki, at allir norðmenn fáa útgoldið alt avkastið beinleiðis. Oljugrunnurin hevur sínar reglar, sum siga, at oljupengarnir skulu sparast upp til komandi ættarlið. Bert ein lítil partur av avkastinum fer til almennar íløgur. Ì dag eru umleið 5000 milliardir kr. í norska oljugrunninum, og svarar hetta til eina millión fyri hvønn norðmann. Arliga frágreiðingin um støðuna hjá norska oljugrunninum kemur 28. februar.

Keldur:

NTB

Hegnar Online

Aftenposten

Energy Watch